Nýggjur sáttmáli

Karsten Hansen hevur góðtikið ein nýggjan sáttmála millum SEV og Maskinmeistararfelagið. Sostatt var ikki neyðugt hjá løgtinginum at koma upp í leikin

SÁTTMÁLI
Heri á Rógvi

Framhaldssøgan við SEV, Maskinmeistarafelagnum og Karsten Hansen er nú liðug á hesum sinni. Fyri hesar tríggjar bíðar enn onkur trupul uppgáva í nærmastu framtíð.

Mynd: Jan

Løgtingið kom ikki saman týskvøldið at viðgera sáttmálaviðurskiftini hjá maskinmeistarunum hjá SEV, og streymurin fer heldur ikki. Karsten Hansen, landsstýrismaður í lønarmálum, hevur góðkent sáttmálan, og tískil skuldi hetta málið nú verið avgreitt.

Sáttmálin er við einari broyting orðarætt hin sami, sum SEV og Maskinmeistarafelagið gjørdu, og Karsten Hansen ikki vildi góðtaka.

Einasti broytingin er, at eitt sáttmálin nú er galdandi til 1. juli 2005 heldur enn 1. mars 2005. Tískil er sáttmálin galdandi í tvey ár og fýra mánaðir.

Sáttmálin gevur 4,3% í lønarhækkan 1. mars 2003 og somu hækkan 1. mars 2004. Hvørt ár hækkar eftirlønargjaldið 1%. Afturat eru ymsar umflokkingar gjørdar og vaktargjøld ásett.

Maskinmeistarafelagið roknar hetta til eina lønarhækkan áljóðandi 10,96% yvir 28 mánaðir. Hetta er eitt sindur meira enn arbeiðarafeløgini fingu yvir tvey ár.

Jógvan Nybo, Maskinmeistarafelagið:

Væl nøgdur

Hóast tað hevur verið hart í seinastuni, so er formaðurin hjá Maskinmeistarunum nøgdur við endaligu semjuna

SÁTTMÁLI
Heri á Rógvi

Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum er bara heilt væl nøgdur, nú ein nýggjur sáttmáli, sum er góðkendur, er undirskrivaður millum Maskinmeistarafelagið og SEV.

Vit sjálvandi heldur havt tann fyrra sáttmálan, men vit eru nøgdir. Vit vóru eisini væl nøgdir við tann fyrra sáttmálan. Tað var tí, vit skundaðu okkum at skriva undir, sigur Jógvan Nybo.

Men hví velur Maskinmeistarafelagið at ganga við til hetta?

– Vit dugdu at síggja, hvønn veg tað bar, og vit valdu tí at siga ja til hendan sáttmálan, sum er fullkomiliga eins sum – bert longdur fýra mánaðir.

Semingsstovnurin kom ongantíð upp í leikin. Partarnir funnu sjálvir fram til eina semju.

– Hetta modellið hevur verið uppi og vent fyri fleiri vikum síðani. Tá kundi Karsten Hansen ikki góðtaka tað, men brádliga var nóg gott, sigur Jógvan Nybo.

Maskinmeistarafelagið kravdi, at Karsten Hansen skuldi boða frá alt fyri eitt, um hann góðkendi sáttmálin. Og tað gjørdi hann so, soleiðis at sáttmálin verður settur í gildi, og maskinmeistrararnir fáa síni 4,3% afturvirkandi.

– Vit vildu ikki enda í sama sirkusinum aftur, sigur Jógvan Nybo.

Tíðin ovast á breddanum hevur ikki bara verið stuttlig hjá Maskinmeistarunum Hetta hevur verið ótrúliga hart. Men vit hava ikki annað at samráðst til ein sáttmála sum vanligt, sigur Jógvan Nybo.

Men taka Maskimeistararnir ikki alt ov lítið atlit til búskapin og samfelagsligugongdina við einari sомikið stórari lønarhækkan?

– Eg eri als ikki samdur við tí, at lønarhækkanin er ov stór. Eg haldi, at lønirnar skuldu verið enn betri, tí tær eru einki høgar sum er, sigur Jógvan Nybo.

Karsten Hansen:

Noyddir at fylgja

–Eg havi allatíðina sagt, at maskinmeistararnir kundu fáa tað sama, sum feløgini á tí privata arbeiðsmarknaðinum, sigur Karsten Hansen, sum kortini heldur, at lønarhækkanin er alt ov stór

SÁTTMÁLI
Heri á Rógvi

Nú sáttmáli loksins er undirskrivaður og góðkendur millum SEV og Maskinmeistarafelagið, so er Karste Hansen, landsstýrismaður, framvegis sannførdur um, at lønarhækkanin er ov stór.

Men Karsten, sum hevur síðsta orðið, hevur góðkent, og harvið verður sáttmálin nú settur í gildi.

– Eg havi allatíðina sagt, at maskinmeistararnir kundu fáa tað sama, sum feløgini á tí privata arbeiðsmarknaðinum samdust um. Nú fáa maskinmeistararnir tað sama sum hini, sigur Karsten Hansen.

Hann sigur, at tað so við og við gjørdist greitt, at arbeiðarafeløgini fóru at fáa ein lutfalsliga stóra lønarhækkan, og tískil gekk hann við til, at maskinmeistararnir hjá SEV fingu tað sama eftir hansara tykki.



Men undan semjuni á privata arbeiðsmarknaðinum hevði Karsten ikki góðkent eina nýggju prosent lønarhækkan.

– Teir privatu hava lagt eina linju, og hana vóru vit í hesum førinum noyddir at fylgja, sigur Karsten Hansen.

Ov nógv

Sum landsstýrismaður í lønar- og fíggjarmálum hevur Karsten Hansen ábyrgdina av, at føroyski búskapurin klárar seg sum best. Skulu vit trúgva landsstýrismanninum, so er hetta langt frá tað besta, sum kundi henda fyri búskapin.

– Eg havi eina ábyrgd sum landsstýrismaður at syrgja fyri, at vit framvegis hava ein góðan búskapin og eitt kappingarføri. Feløgini hugsa sjálvandi um sínar limir, men vit mugu øll hava tað samfelagsliga í huganum, sigur Karsten Hansen.

Og fylgjurnar av hesum lønarhækkingum eru fyrst og fremst verri kappingarføri, heldur landsstýrismaðurin.

– Hjá tí almenna fer hetta eisini at merkjast við, at vit í fyrstu atløgu fáa fleiri skattainntøkur av hægru lønunum. Men hetta er løtuvinningur, og vit eru í stórum vanda fyri at brenna ljósið í báðum endum, sigur Karsten Hansen og vísir til, at við verandi búskaparútlitum verður torført at finna peningin at gjalda hesar hægri lønir fyri.

Til samráðingar

1. oktober ganga ein longri røð av sáttmálum hjá Karsten Hansen út. Tá fakfeløgini á privata arbeiðsmarknaðinum hava fingið somikið stóra lønarhækkan, so er lætt at hugsa sær, at Starvsmannafelagið og hini feløgini fara at fáa í øllum førum tað sama.

Vit spyrja eisini Karsten Hansen um hetta. Hóast hann skákar sær undan spurninginum, so ásannar hann, at tað verður ikki sloppið uttanum hetta soleiðis uttan víðari.

– Vit fara til samráðingar við opnum sinni. Tey almenn løntu skulu ikki vera verri fyri enn hini. Tey eru í mínari verð verd sína løn, sigur Karsten Hansen.

Lærdómurin

Seinastu nógvu tíðina hevur málið um SEV, maskinmeistarar og Karsten Hansen verið á breddanum. Fleiri vildu óivað verið hetta fyri uttan, og teirra millum telist eisini Karsten Hansen.

– Sæð í bakspeglinum kundu vit verið hetta fyriuttan. Tað er neyðugt at fáa kalt vatn í blóðið. Eingin hevur fyrimun av hesum óskilinum, sigur Karsten Hansen.

Og eins og aðrir politikararnar vil Karsten Hansen hava greiðari viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum.

– Vit mugu hava tað sum aðrastaðni við betri skipaðum viðurskiftum og fráboðanarskyldu. Í Danmark eru tað fakfeløgini, sum ynskja høvuðsavtalur og taka stig til hetta. Í Føroyum tykjast fólk berjast ímóti øllum, sum líkist skipaðum viðurskiftum, sigur Karsten Hansen.

Kunngerð elvir til politiskt rumbul

Høgni Hoydal kann rokna við einum politiskum ódnarveðri. Hann hevur í einari feskari kunngerð sligið fast, at persónsupplýsingar hjá bankunum kunnu ikki flytast av landinum. Tað er beint ímóti tí, sum peningastovnar og vinnan hava ført fram. Kristian Magnussen, løgtingsmaður, kallar tað valdsmisnýtslu og vil hava løgmann upp í málið

PERSÓNSUPPLÝSING
Ingi Rasmussen

Nýggja Gjaldskipanin, sum Elektron umsitur, kann verða steðgað, tí Høgni Hoydal hevur lýst eina nýggja kunngerð, ið steðgar flytingum av persónsupplýsingum uttanlands

Mynd: Jens K. Vang

Málið um vernd av persónsupplýsingum hevur fingið eina óvæntaða vend. Høgni Hoydal, landsstýrismaður við løgarmálum, hevur lýst eina kunngerð, sum steðgar flyting av persónsupplýsingum av landinum, har høvuðsinnihaldið er peningaligar flytingar.

Tað merkir helst, at tann Gjaldskipanin, sum peningastovnarnir hava brúkt í meira enn eitt ár, verður steðgað. Talan er eina føroyska útgávu av Betal-ingService, sum Elektron hevur ment í samstarvi við PBS. Skipanin hevur við sær, at allar sjálvvirkandi flytingar fara til Danmarkar at venda.

Kunngerðin kemur ikki at raka gjaldkortini, FR-kort og VISA-kort, tí eitt undantak er, sum sigur, at tað er í lagi at flyta persónsupplýsingar, tá tað fer um staknýtaraskipanir.

Kunngerðin er lýst 16. juni og hevur virknað frá 1. januar 2002.

Óvæntað stig

Stigið er óvæntað, tí Høgni Hoydal reisti málið sum eitt tingmál fyrr í ár. Tað gjørdi hann, tí tað var ivi um, hvør tingsins vilji í grundini var. Spurningurin er, um nýggja lógin um vernd av persónsupplýsingum frá 2001 fevndi um flytingar til Danmarkar.

Rættarnevndin, har Jógvan á Lakjuni er formaður, sultaði tilvitað málið, tí tað vóru so nógvir ivaspurningar, og tí kom tað ikki ígjøgnum hesa tingsetanina.

Í staðin hevur Høgni Hoydal so sjálvur lýst tað í einari kunngerð, sum hann ætlaði at fáa tingið at lóggeva ígjøgnum. Sostatt fekk tingið ongantíð høvi at svara, hvat tað meinti, áðrenn Høgni Hoydal skar ígjøgnum.

Hamrandi ólógligt

Mannagongdin skelkar Kristian Magnussen, løgtingsmann fyri Javnaðarflokkin, sum hevur fylgt málinum um persónsupplýsingar serliga væl. Hann hevði júst fingið eitt vátt Kunngerðarblað gjøgnum hurðina við postinum, tá vit fingu orðið á. Hann ánaði ikki, at Høgni Hoydal hevði gjørt eina kunngerð. Og hann er milt sagt skelkaður.

– Nú er hann langt úti. Mín niðurstøða er, at nú snýr tað seg bara um at vinna. Høgni Hoydal tolir ikki, at hann ikki fær sítt ígjøgnum, men hann hevur ikki lógargrundarlag fyri tí, sum hann ger. Fyri at siga akkurát, sum er, so er hetta eftir mínari bestu sannføring brand hamrandi ólógligt, og tað undrar meg stórliga, at aðalstjórin í løgmálaráðnum leggur navn til. Tað boðar ikki frá góðum fyri føroyska løgfrøði, sigur Kristian Magnussen.

Høgni Hoydal hevur sambært lógini um vernd av persónsupplýsingum heimild at gera kunngerðir, sum útgreina lógina. Men hann skal hava heimild í lógini fyri tí, sum hann ger. Og tað hevur hann ikki sambært Kristian Magnussen. Millum annað eru nøkur atlit, sum siga, at upplýsingar kunnu sendast til trygg lond, og tað er Danmark í hesum føri.

Rættarmál í væntu

Væntast kann, at stórur partur av vinnuni fer at leggja sak ímóti landsstýrinum. Eitt nú bankar, tryggingar og onnur eru farin yvir til Gjaldskipanina.

Føroyingar hava mest sum slept tí gomlu V&T-skipanini, sum varð gjørd á Elektron, og nú er tað Gjaldskipanin, sum stýrir sjálvvirkandi flytingum. Áðrenn farið var at menna skipanina, fekk Elektron grønt ljós frá Dátueftirlitinum, sum er hægsti myndugleiki á økinum, og tí hava tey sitt á tí turra og kunnu við góðari samvitsku krevja endurgjald frá landinum. Aðrastaðni í blaðnum váttar Jørn Astrup Hansen, bankastjóri, at tað kann gerast avleiðingin.

Verður reist politiskt

Málið var so fekst, tá vit tosaðu við Kristian Magnussen, at hann enn ikki hevði hugsað, hvat hann ætlaði at gera. Men nú heldur hann, at skerast skal ígjøgnum.

– Eg haldi,at løgmaður eigur at hyggja at málinum. Hann skal hava eftirlit við, at hansara landsstýrismenn røkja sítt embæti á fullgóðan hátt. Um hann einki ger, eigur landsstýrismálanevndin at taka málið upp, tí Høgni Hoydal umsitur ikki á fullgóðan hátt í hesum føri. Hetta er valdsmisnýtsla, sigur Kristian Magnussen.

Tað eydnaðist ikki at fáa orðið á Høgna Hoydal, landsstýrismann, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Fakta

Brot úr kunngerð nr. 94:

§ 1. Kunngerðin fevnir um persónsupplýsingar og viðgerð av persónsupplýsingum hjá peningastovnum

§ 2. Persónsupplýsingar og viðgerð av persónsupplýsingum í skipanum í Føroyum, hvørs høvuðsinnihald og –nýtsla eru peningaligar transaktiónir, flytingar ella annað samskifti ella virksemi millum einstaklingar, virki, stovnar o.t. í Føroyum, kunnu ikki flytast av landinum. Heldur ikki kann ein partur av hesum flytast av landinum.

§ 3. Brot á § 2, stk. 1 í kunngerðini verður revsað við bót.

Kann enda sum rættarmál

Kemur tað til, at nýggja Gjaldskipanin verður tikin av, tí nýggj kunngerð er komin í gildi, so útilokar Jørn Astrup Hansen ikki, at Elektron og peningastovnarnir draga landsstýrið í rættin. Astrup undrast á nýggju kunngerðina, sum er vend ímóti peningastovnunum

PERSÓNSUPPLÝSING
Ingi Rasmussen

– Vit eru bilsin og duga ikki heilt at gjøgnumskoða avleiðingarnar av hesum enn.

Tað er fyrsta viðmerkingin frá Jørn Astrup Hansen, bankastjóra og nevndarformanni í Elektron, nú Høgni Hoydal hevur gjørt av at skera ígjøgnum í stríðnum um persónsupplýsingarnar.

Jørn Astrup Hansen hevði júst fingið kunngerð nr. 94 frá 16. juni stungið í hondina, tá Sosialurin fekk orðið á hann. Hann helt, at skuldi kunngerðin takast fyri fult, so fór hetta at fáa avleiðingar fyri alt peningaligt samskifti, sum er millum Føroyar og onnur lond.

Alt stríðið byrjaði við einari nýggjari skipan, ið peningastovnarnir tíðliga í fjør settu í verk í Føroyum. Hon nevnist Gjaldskipan. Skipanin er ment í samstarvi millum Elektron og Pengeinstitutternes Betalings Systemer (PBS) í Danmark og er ein føroysk útgáva av væl kenda BetalingsService hjá PBS. Talan er sostatt um sjálvvirkandi peningaflytingar, sum fara til Danmarkar at venda og avgreiðast.

Sambært nýggju kunngerðini er hetta ikki loyvt. Men Jørn Astrup Hansen sigur, at tey fyribils fara at halda fram at brúka hana, sum einki var hent, tí tey hava fingið loyvi til tess frá Dátueftirlitinum.

Nýggja kunngerðin er afturvirkandi. Sagt verður, at hon fær gildi frá 1. januar 2002, og tað er áðrenn nýggja Gjaldskipanin kom í gildi. Sostatt er lítið at ivast í, at kunngerðin er ætlað at fevna um Gjaldskipanina.

– Fer tað at vísa seg, at Gjaldskipanin verður steðgað, so er ein nýggj støða. Vit hava fingið loyvi til at brúka hana, og vit kann ikki útiloka, at talan verður um eitt rættarmál, tí tað hevur kostað okkum og okkara kundum nógv at fara yvir til skipanina, sigur Jørn Astrup Hansen.

Eitt rættarmál fer helst bæði at snúgva seg um, hvørt Høgni Hoydal hevur lógina við sær, og í øðrum lagi verður talan um eitt endurgjaldskrav.

Jørn Astrup Hansen undrast annars stórliga um orðaljóðið í kunngerðini. Hevði tað verið slagið av upplýsingum, sum var kjarnin í henni, so hevði hann skilt tað. Men eftir øllum at døma er ætlanin at raka peningastovnarnar serliga.

– Eg upplivi hetta sum serlóggávu fyri okkum, og tað havi eg ilt við at skilja. Um endamálið er at verja Elektron, so hevði tað verið best, um tosað var um hetta millum partaeigararnar av Elektron, sum eru landsstýrið og peningastovnarnir í felag, sigur Jørn Astrup Hansen.

Jørn Astrup Hansen er bilsin av nýggju kunngerðini, sum steðgar útflutningi av persónsupplýsingum og dugir ikki gjøgnumskoða fylgjurnar enn